# Ískoytispolitikkur hjá Kringvarpi Føroya

*Við at stuðla serstøkum og samskipaðum tiltøkum í Kringvarpi Føroya við einum ískoyti fáa virki, handlar og stovnar møguleika fyri at fáa sítt navn ella ávarp sligið fast í tilvitanina hjá føroyskum lurtarum og hyggjarum.*

*Kringvarp Føroya sæst og hoyrist í hvørjum húski í Føroyum og alt fleiri hoyra og síggja sendingar Kringvarpsins á alnótini.*

**Politisku og hugsjónarligu treytir Kringvarpsins**

KvF hevur sum gjaldsfíggjaður public service stovnur ávísar skyldur í arbeiðnum at fremja sítt virksemi. Yvirskipað er virksemið skrásett í public service sáttmála millum KvF og Mentamálaráðið.

Harafturat eru lógirnar um Kringvarp Føroya, fjølmiðlaábyrgdarlógin, revsilógin og reglur um fjølmiðlasið viðkomandi fyri virksemi kringvarpsins. KvF skal halda seg innan karmarnar í hesum sáttmála, lóggávu og reglum.

Eisini skal KvF hava stórt **trúvirði** í síni miðling, vera **óheft**, hava **fjølbroytni** og **breidd** og **dygd**.

Nevndu viðurskifti skulu liggja til grund, tá samráðst verður um avtalur um ískoyti.

**Allýsing fyri ískoytisveitingar**

Ein ískoytisveiting í Kringvarpsins virksemi er ávís stuðulsveiting sum peningur, stuðul ella vinningur, sum verður latin.

Eftir grein 8, stykki 2, í lóg um Kringvarp Føroya er treytin fyri at kunna útvega Kringvarpi Føroya inntøkur frá ískoytisveitarum, at talan er um **serstøk og samskipað tiltøk.**

Tað veri seg størri og kostnaðarmiklar sendirøðir, t.d. innan greinir sum dokumentar, drama og undirhald, ella kostnaðarmiklar ítróttarframleiðslur.

Eftir grein 8, stykki 6, í lóg um Kringvarp Føroya skal greiður skilnaður vera millum programminnihald og ískoytisveitingar.

Fyritøkur, virki, handlar, stovnar, feløg o.l. kunnu gera sáttmála/ar um ískoytisveiting/ar.

Politiskir flokkar, fakfeløg, arbeiðsgevarafeløg, rúsframleiðarar ella átrúnaðarligir felagsskapir kunnu ikki gera sáttmálar um at lata ískoyti.

Ein ískoytisveitari kann í avtalu ikki seta treytir um innihald, arbeiðshátt ella skrá hjá kringvarpinum.

Eingin ískoytisveitari kann í avtalu krevja sersømdir fyri seg, sína fyritøku, vørur ella tænastur.

Eingin ískoytisveitari kann seta treytir við atliti at øðrum ískoytisveitingum ella ískoytisveitarum.

**Aktualitetur og Børn & Ung**

Ískoyti kann ikki latast tíðindum, aktualitetssendingum ella øðrum sendingum á deildini Aktuelt.

Ískoyti kann verða latið størri og samskipaðum tiltøkum, sum eru ætlað børnum, t.d. eini størri jólakalendaraframleiðslu. Ein tøkk fyri ískoyti verður nevnt ella skrivað seinast í tí stóru og samskipaðu sendingini/sendirøðini.

**Mentan og ítróttur**

Undir deildini Mentan kann ískoytisveiting latast, tá talan er um:

- Serstøk og samskipað tiltøk, t.d.innan tónleik, dokumentar, drama ella undirhald.
- Størri og samskipað ítróttartiltøk, innanlands og uttanlands, t.d. miðling frá Oyggjaleikum ella tílíkum ítróttarstevnum.

**Møguleikar fyri starvsfólk**

Miðlafólk kunnu einsæris ella í toymum taka stig til sendingar-, sendirøðir, sendifrásagnir ella miðlaátøk, sum hvíla á ískoytisveiting.

Miðlafólk kunnu einsæris ella í toymum taka stig til serstøk og samskipað tiltøk.

Slík tiltøk kunnu ikki sendast í sambandi við tíðindi ella aktualitet.

Starvsfólk, sum vanliga starvast á deildini Aktuelt, kunnu ikki vera við í slíkum átøkum.

Leiðsla kringvarpsins skal altíð frammanundan góðtaka slíkar ætlanir og ískoytisavtaluna/avtalurnar.

## Mannagongdir fyri ískoytisveitingar

Navnið á ískoytisveitaranum verður nevnt undan og eftir serstøku sendingina ella sendirøðina í einum "trailara". "Trailarin" kann í mesta lagi vara 10 sekund, galdandi bæði í sjónvarpinum og í útvarpinum.

Umframt navn/ávarp kann í stuttum kunnast um, hvat virksemið/vøran/tænastan hjá ískoytisveitaranum er. Tó kann ikki lýsast við, hvussu virksemið/vøran/tænastan er.

Ein avtala um ískoyti í sambandi við sendirøðir skal í minsta lagi vera galdandi í 6 vikur, ella so leingi sendirøðin er á skrá.

Hvørja ferð talan er um ískoyti, skal ein avtala gerast ímillum leiðslu – tað merkir deildarleiðara ella stjóra – og ískoytisveitara/ar.

Leiðla Kringvarpsins kann  lata øðrum  persóni heimildina at gera slíkar avtalur. Tó fær eingin avtala virknað, fyrr enn leiðslan í Kringvarpinum hevur góðkent avtaluna.

Avtalurnar um ískoytisveiting skulu vera skrivligar. Tær skulu greitt áseta virðið á veitingini.

Somuleiðis skulu avtalurnar áseta, hvørja sending, sendirøð ella tiltak, ískoytisveitarin letur ískoyti til.

*Uppskot um orðingar:*
Speak undan: "Navnið á serstøku og samskipaðu sendingini" verður send við stuðli frá....
Speak: "Navnið á serstøku og samskipaðu sendingini varð send við stuðli frá "nevnið á ískoytisveitaranum"
Speak: "Navnið á ískoytisveitaranum" hevur stuðla "navnið á serstøku og samskipaðu sendingini"
Speak: "Navnið á ískoytisveitaranum" stuðlaði "navnið á serstøku og samskipaðu sendingini"